

## Starv á Hagstovuni

Til at hava um hendi fíggjarlig hagtøl um tað almenna – land og kommunur – sóknast vit eftir einum vællærdum og áhugaðum starvsfólki.
Fíggjarliga uppgerðin av tí almenna er partur av tjóðarroknskapinum, men er eisini grundarlag undir sjálvstøðugum hagtølum um leiklutin hjá tí almenna í samfelagnum.

Tú verður partur av einum stovni, sum hevur informasjón til høvuðsstarv, har tú fært høvi at hava alt verkið um hendi - heilt frá tanka til útgávu.

Fyrimunur er at vera útbúgvin í búskaparfrøði ella samfelagsfrøði. Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi fakfelag.

Umsóknir skulu vera Hagstovuni í hendi í seinasta lagi 1. novembur 2007. Hevur tú áhuga í starvinum og vilt vita meira, vend tær so til Hagstovuna á telefon 352800 og fá fatur á Hermanni Oskarssyni, stjóra, ella John Jacobsen, deildarleiðara.

TEAM85

HAGSTOVA FØROYA
GLYVURSVEGUR 1 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TLF. +298 35 28 00 · FAX +298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO

## Tiltak um feskan fisk

Føroya Ráfiskakeyparafelag skipar 26. oktober 2007 fyri einum tiltakið fyri fiskivinnuna um feskan fisk.

Á skránni er handfaring av ráværu við denti á ymiskar kølihættir, superkøling av fiski, logistikkur og sporføri.

Granskingarstjórin á íslendska granskingarstovninum Matis Sigurjón Arason og starvsfelagið hansara Bjørn Margeirson koma til Føroya at kunna okkum um hetta. Harumframt kemur Steinbjørn í Dali at greiða frá royndunum frá at íverkseta elektroniskt sporføri í fiskivinnuni. Somuleiðis koma Jóhanna á Bergi og Magni Arge at kunna um framtíðarætlanir innan flutning av fiskavørum.



### Tíð og stað
Skeiðið verður tann **26. oktober 2007 kl. 08:30** á Hotel Føroyum.

### Kostnaður
Prísurin er kr. 1.000,- fyri limir í Føroya Ráfiskakeyparafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag og kr. 1.500,- fyri ikki limir. Ábit verður aftaná tiltakið.

### Tilmelding
Tilmelding á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum www.industry.fo. Freistin fyri tilmelding er 24. okt.

VINNUNÁM

www.sosialurin.fo

# Fyrilestur í miðlahúsinum

Fyrilestur við **Ole Spiermann,** professara í altjóðarætti, um evnið ríkisfelagsskapurin og ríkisrættarstøða Føroya, verður í miðlahúsinum

**hóskvøldið 25. oktober. kl. 19:30**



**Ole Spiermann**

Ole Spiermann hevur skrivað fleiri greinar og bøkur um altjóðarætt og fekk longu í 1994 gullheiðursløn fyri slóðbrótandi verkið um fullveldishugtakið, »Enten & Eller«.

***Øll eru vælkomin***




Tórsgøta 1 · Tel 34 18 00 · Fax 34 18 01
post@sosialurin.fo · www.sosialurin.fo

miðlahúsið í Vágsbotni

# Kokkur

Við hesum verður søkt eftir kokki til Strandfaraskip Landsins at seta í fast starv skjótast møguligt

Viðkomandi skal byrja umborð á Teistanum, men kann til eina og hvørja tíð verða fluttur umborð á onnur skip hjá Strandfaraskipum Landsins.
Arbeiðs- og vaktarskipanin er fyriskipað í mun til galdandi ferðaætlan hjá tí skipi, ið ein er settur umborð á.

**Starvið fevnir um**
Høvuðsuppgávan hjá kokkinum er at matgera til manningina, og at hava sølubúðina um hendi.

Kokkurin hevur ábyrgd av:
- At reinføri er eftir galdandi ásetingum
- Tryggja at trygdin umborð er í samsvari við altjóða krøv
- Tryggja gott samstarv við myndugleikar og aðrar samstarvsfelagar

**Førleikakrøv**
- Praktiskar royndir sum kokkur
- Trygdarskeið
- Heilsuprógv
- Góð samstarvsevni
- Góðan røkjuskap

**Vit bjóða**
- Eitt sjálvstøðugt og spennandi starv
- Fakligar avbjóðingar
- Eitt starv sum tú sleppur at skipa og menna
- Gott samanhald

**Setanartreytir**
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

Strandfaraskip Landsins
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

**Umsóknarfreist**
Freistin at søkja starvið er 30. oktobur 2007, kl 12:00

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jan Haldansen, deildarleiðara, á tlf. 34 30 00 lokal 3041, ella e-post: jah@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landins (SSL) eru landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, hvørs endamál er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir: 22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir. Samlaða talið av ferðafólkum við SSL í 2006 var 1,1 millión: 620 túsund við bussunum og 480 túsund við ferjunum. Talið av flutningsanleggum er 40 bussar, 8 ferjur og farmaflutningsútbúnaður. Starvsfólkini eru á leið 170 í tali, svarandi til 120 ársverk. Fyrisitingin á SSL er skipað í fimm deildir: Samferðslu-, Sjó-, Fíggjar-, Starvsfólka-, Farma- og cateringdeild.